UTTAN ÚR HEIMI

## Einki høpi í skuldsetingum

Dan Brown, sum hevur skrivað ta heimskendu bókina „Da Vinci-kodan", vísir aftur skuldsetingunum um, at hann hevur brúkt bókina „Hellig blod, hellig gral" sum grundarlag fyri bók síni. Men tað halda Michael Baigent og Robert Leigh, sum hava skrivað hina bókina.

Teir báðir hava stevnt Dan Brown eftir endurgjaldi. Málið var fyri í býarrættinum í London mánadagin, og har vísti Dan Brown skuldsetingini aftur. Í einum tíðindaskrivi aftan á rættarfundin segði hann, at skuldseringin er púra ógrundað.

– Eg havi ikki brúkt teirra kanningar í sambandi við bókina. Tvørturímóti var tað kona mín, sum gjørdi nógvar av kanningunum, segði Dan Brown. Hann fær stuðul frá útgevara sínum, sum hevur sagt, at Dan Brown var komin væl áleiðis við bók síni, áðrenn hann yvirhøvur hevði sæð bókina hjá Baigent og Leigh.

„Da Vinci-kodan" er seld í meiri enn 40 milliónum eintøkum, og tað hevur givið Dan Brown umleið 500 milliónir krónur í lumman. Tann 19. mai verður filmsútgávan av bókini frumsýnd.

## Berlusconi rýmdi



*Berlusconi rýmdi úr sjónvarpinum í øðini*

Italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, var so misnøgdur við nakrar spurningar, sum hann fekk undir einari beinleiðis sjónvarpssending, at hann rýmdi úr sjónvarpshølunum.

Sambært BBC spann øði í Berlusconi, tá sjónvarpskvinnan Lucia Amnunziata setti honum nakrar spurningar í sambandi við tjóðartingsvalið, sum verður í næsta mánað, og tá hon spurdi hann um hansara fíggjarviðurskifti og støðuna í Irak. Berlusconi svaraði við at leggja sjónvarpskvinnuna undir at hoyra til vinstravongin í italskum politikki, og at tað var ikki hennara uppgáva at gera av, hvat hann skal gera.

– Hetta er mín sending, og her er tað eg, sum geri av, hvat spurt verður, svaraði Lucia Amnunziata. Tá sendingin hevði vart einar 20 minuttir, reistist Berlusconi og rýmdi í øðini.

## Fólk í Asia vita meiri

Ein kanning hjá OECD vísir, at skúlaverkini í fleiri asiatiskum londum virka betur enn skúlaverkini í Evropa, og at fólk í Asia tí hava eitt hægri kunnleikastig enn evropearar.

Týskland og Frakland fáa skyldina av, at kunnleikastigið í Evropa megnar ikki at fylgja við, tí skúlaskipanin í teimum báðum londunum er alt ov stirvin, sigur Andreas Schleicher, sum hevur gjørt kanningina fyri OECD. Hann vísir á, at tey bæði londini standa fyri 35 prosentum av búskapinum í ES, men at tey megna ikki at fylgja við, tá tað snýr seg um kunnleika og vitan.

Øðrvísi er í Asia, har kunnleikastigið í londum sum Kina og India er hækkað munandi tey seinnu árini, men einki land kann tó samanberast við Suðurkorea. OECD vísir á, at fyri 40 árum síðani var landið eitt av teimum fátækastu í heiminum, men í dag hava heili 97 prosent av teimum 24 til 34 ára gomlu eina útbúgving.

OECD sigur, at Finnland er tað landið í Evropa, sum stendur seg best í hesari kappingini.

## Undur í Grikkalandi

Tá gravarar fyri nøkrum døgum síðani gróvu leivdirnar av einum munki uppaftur, fingu teir ein hvøkk, tí hóast munkurin doyði fyri 15 árum síðani, var líkið at kalla einki broytt.

Síðani hava fýra læknar skoðað líkið av Vissarionas Korkoliakos fyri at loysa gátuna, og fólk í hundraðtali hava vitjað gravstað hansara. Men Nikolaos, biskupur, hevur gjørt greitt, at munkurin verður ikki gjørdur til halgimenni, sjálvt um hann viðgongur, at hetta man vera eitt tekin frá Guði.

# Nú verður verri at fáa Mladic og Karadzic

**Nú Slobodan Milosevic er deyður, verður tað uppaftur truplari at fáa Serbia at útflýggja Ratko Mladic og Radovan Karadzic**

KRÍGSBROTSVERK

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

ES vil ikki tosa við Serbia um limaskap, fyrr enn landið hevur útflýggja fyrrverandi bosniaserbiska generalin Ratko Mladic og tann politiska leiðaran Radovan Karadzic, sum eru skuldsettir fyri krígsbrotsverk, og krígsbrotsmannadómstólurin í Haag hevur fleiri ferðir kravt at fáa fatur á teimum.

– Nú Milosevic er deyður, ræður um at fá hinar brotsmenninar fyri rættin, segði Carla del Ponte, høvuðsákæri, í gjár.

Men norski Balkan-serfrøðingurin Svein Mønnesland heldur, at tað kann gerast trupult at fáa fatur á Mladic og Karadzic. Hann vísir á, at nógvir serbar tulka rættargongdina í Haag sum ágang ímóti serbisku tjóðskaparkensluni, og serbiskir fjølmiðlar vóru eisini skjótir at skriva, at Haag hevði dripið Milosevic.

– Nú hann doyði uttan dóm, fara nógvir serbar at spyrja, um hann ikki var ósekur kortini, og tað fer ikki at gera tað lættari hjá serbisku stjórnini at útflýggja fleiri av teimum ákærdu, sigur Svein Mønnesland við Dagaavisen. Hann væntar eisini, at teir tjóðskaparsinnaðu í Serbia fara at fáa vind í seglini, nú Milosevic er deyður, og at tað fer at avmarka rásarúmið hjá stjórnini.



*Nú verða Ratko Mladic og Radovan Karadzic neyvan tiknir og sendir til Haag fyribils*

Bretski Balkan-serfrøðingurin Brace Gubacic væntar heldur ikki, at serbar fata at útflkýggja Ratko Mladic og Radovan Karadzic. Hann vísir á, at tað verður sera torført hjá serbisku stjórnini at sannføra fólkið um, at landið eigur at útflýggja teir báðar, tí fólkið hevur ikki álit á dómstólinum. Teir tjóðskaparligu serbarnir hava omngantíð viðurkent dómstólin í Haag og serliga ikki, nú Milosevic dsoyði, áðrenn mál hansara kom til dóms. Tvørturímóti væntar Brace Gubacic, at teir tjóðskaparsinnaðu stuðlarnir hjá Milosevic fara at gera alt fyri at tarna arbeiðinum hjá dómstólinum.

Annars hevur tað ikki staðið á hjá dómstólinum at útvega próvtilfar ímóti Mladic og Karadzic. Sum generalur var tað Mladic, sum hevði ábyrgdina av hópmorðinum í bosniska býnum Screbrenica, tá umleið 7.000 menn og dreingir vórðu fyribeindir. Karadzic hevði ta politisku leiðsluna og stóð á odda fyri at býta Bosnia sundur í etnisk øki.

# Kavin er gulur

**Í Suðurkorea hava myndugleikarnir biðið fólk halda seg innandura, tí veðurmenninir vænta gulan kava**

KAVI

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fólk í høvuðsstaðnum Seoul og økinum har vesturi í landinum eiga at halda seg innandura, og tey, sum noyðast at fara út fyri dyr, skulu hava eitt ella annað plagg fyri munnin.

Hesi boðini komu frá suðurkereonsku veðurstovuni í gjár, og orsøkin er, at veðurmenninir vænta tað, sum teir kalla gulan kava. Tað siga teir, tá illveður kemur um markið úr Kina og hevur sandrok við sær, og tá sandur og kavi verður blandað saman, verður kavin gulur.

Kavaódnir eru rættiliga vanligar á koreanska nesinum, men í vár hevur meiri sandur úr Kina verið uppi í kavanum enn onnur ár, skrivar AP úr Seoul.